LM-088/2023

fylgiskjal 15.

KVINNUFELAGIÐ Í HAVN

Løgmálaráðið
T-postur: lmr@lmr.fo

Tórshavn 5. februar 2024

Hoyringssvar til: Uppskot til Løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin)

Kvinnufelagið í Havn fer hervið at takka landsstýrismanninum í lógarmálum fyri at hava orðað uppskot til løgtingslóg um fosturtøku.

Kvinnufelagið fegnast um, at sambært lógaruppskotinum verður loksins farið frá eini forboðslóg við strongum undantøkum til eina lóg, har kvinnur fáa sjálvsavgerðarrætt til egnan kropp og egið lív. Verður lógaruppskotið samtykt, er tað størsta javnstøðupolitiska stigið, sum er tikið í Føroyum seinastu mongu áratíggjuni.

Kvinnufelagið tekur sum heild undir við lógaruppskotinum, og hevur hesar viðmerkingar:

Fosturtøka, sum ikki krevur loyvi
Í § 1 verður skotið upp, at orðingin "Kvinna, sum býr í Føroyum og er við barn…" verður broytt til "Kvinna, sum býr í Føroyum og er gravid…".

Loyvi at fáa fosturtøku eftir 12. viku
Kvinnufelagið tekur undir við ásetingunum í greinunum 3-5.

Felagsreglur
Kvinnufelagið tekur undir við greinunum 6-7. Kvinnufelagið fegnast um, at tað er ásett í lógaruppskotinum, at kvinnan skal hava í boði óhefta ráðgeving. Tað er av stórum týdningi, at talan er um eitt tilboð um ráðgeving, og ikki ein tvungin ráðgeving. Somuleiðis er tað týdningarmikið, at tað er ein óheft ráðgeving, sum fakfólk veita.

Umsókn um fosturtøku
Kvinnufelagið tekur undir við hesum. Kvinnufelagið mælir tó til, at orðið "umsókn" verður broytt til "umbøn".

Kvinna undir 18 ár
Kvinnufelagið mælir til at aldurin "18 ár" verður broyttur til "15 ár". Orsøkirnar eru hesar: at kynsligi lágaldurin er 15 ár; at ungar kvinnur, sum eru 15 ár kunnu taka avgerðir um fyribyrgjandi evnir og angri bollar; at ungar kvinnur, sum eru 15 ár kunnu taka avgerð um at gjøgnumføra ein graviditet, og

Kvinnufelagið í Havn – Skipar Hansensgøta 5 – 100 Tórshavn
T-post: mettustova@olivant.fo – www.kvinnufelag.fo – Tlf. nr.: 51 37 84

KVINNUFELAGIÐ Í HAVN

tí eiga hesar kvinnur eisini at kunna taka avgerð um at enda ein graviditet. Sambært galdandi lóg kunnu persónar, sum hava fylt 15 ár taka avgerð um egna viðgerð.

Í § 9 verður gjørdur munur á, um kvinnan er gift ella ikki. Um kvinnur, sum eru giftar kunnu taka hesa avgerð, verður mælt til, at kvinnur sum ikki eru giftar somuleiðis kunnu taka somu avgerð. Kvinnurnar mugu verða javnsettar óansæð um tær eru giftar ella ikki. Kvinnufelagið mælir til at strika ásetingina um giftu.

Vegleiðing og kunning frá læknanum
Kvinnufelagið tekur undir við hesum.

Samráð
Um eitt samráð verður sett, mælir Kvinnufelagið til at broyta § 15. Sambært uppskotinum til áseting kann loyvi til fosturtøku bert verða givið, "um tað er semja um tað í samráðnum." Kvinnufelagið mælir til, at broyta hesa áseting, so hon verður soljóðandi: "Loyvi til fosturtøku kann bert verða givið um ein meiriluti í samráðnum tekur undir við tí."

Sambært § 14 skal samráðið verða mannað við einum persóni við løgfrøðiligari ella sosialari útbúgving umframt tveimum læknaum. Í viðmerkingunum til § 14 stendur, hvørjar uppgávur ávikavist løgfrøðingurin og sosialráðgevin hava í samráðnum. Somuleiðis er ásett, hvørja útbúgving løgfrøðingurin skal hava. Men sambært lógaruppskotinum skal bert annar av hesum persónunum verða limur í samráðnum.

Kvinnufelagið heldur, at tað er óheppið, at tað er landsstýrismaðurin, sum velur limirnar í samráðnum. Kvinnufelagið mælir í staðin til, at tað verður t.d. Fólkaheilsustýrið, sum velur limirnar í samráðnum.

Kæra
Kvinnufelagið tekur undir við, at avgerðir tiknar í samráðnum kunnu kærast til Føroya Kærustovn.

Ársfrágreiðing
Kvinnufelagið tekur undir við hesum.

Revsiásetingar
Kvinnufelagið tekur undir við hesum.

Gildiskoma
Kvinnufelagið tekur undir við, at fosturtøkulógin kemur í gildi 1. juli 2024.

Vinaliga

Kvinnufelagið í Havn

Kvinnufelagið í Havn – Skipar Hansensgøta 5 – 100 Tórshavn
T-post: mettustova@olivant.fo – www.kvinnufelag.fo – Tlf. nr.: 51 37 84